# Stuðla Eysturtimor og El Salvador

**Uttanríkisráðið letur 1, 37 milliónir til tvær stórar verkætlanir í ávikavist Eysturtimor og El Salvador.**

Leo Poulsen



*Charlotte Seymour og Susan Barry vóru í Føroyum fyrst í september fyri at gera vart við arbeiðið hjá Christian Aid, og høvdu eitt nu fund við Jørgen Niclasen fyri at sannføra hann um at stuðla verkætlanini í El Salvador. Hetta er nú eydnast*

Mynd: Álvur Haraldsen

Báðar verkætlanir hava føroyska luttøku, sum inniber at føroyingar ogna sær royndir og kunnleika innan altjóða menningarsamstarv, samstundis sum føroyskur serkunnleiki verður gagnnýttir uttanlands.

Onnur verkætlanin er ein fiskuvinnuverkætlan, sum hevur til endamáls at kanna og lýsa fiskivinnumøguleikar í Eysturtimor. Partur av verkætlanini er at seta í verk eina royndarætlan, sum skal økja um fiskivinnuna og inntøkugrundarlagið í tveimum sera fátækum landslutum í landinum. Sambært Human Development Index er Eysturtimor millum tey allar fátækastu londini í heiminum.

Tað er felagsskapurin Mercy Corps, sum stendur fyri verkætlanini. Umframt fíggjarligan stuðul inniber samstarvið við Mercy Corps fakliga ráðgeving frá Havstovuni, sum skal samstarva við felagsskapin um at kanna og lýsa fiskivinnumøguleikarnar í Eysturtimor.

Verkætlanin í El Salvador hevur til endamáls at geva íbúgvunum í La Paz økinum, sum er sera tilafturskomið, betri atgongd til reint drekkivatn og at betra um kloakkviðurskiftini. Mett verður at fleiri enn 2000 fólk fáa beinleiðis gagn av verkætlanini komandi tvey árini.

Tað er felagsskapurin Christian Aid, sum stendur fyri verkætlanini í samstarvi við lokalar felagsskapir í El Salvador. Samstarvað verður eisini við Reyðakross í Føroyum og ætlanin er at senda eitt fólk frá Reyðakrossi til El Salvador, í eitt styttri tíðarskeið, at luttaka í verkætlanini.

---

Kunngjørt verður, at okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Bertha Weihe Nybo**
**Hvítanes, ættað av Skála,**

andaðist fríggjadagin 12. november í Heiminum við Vallalíð, 92 ára gomul.

Kistan fer frá Heiminum við Vallalíð týsdagin kl. 17.00
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin kl. 13.00

***Familjunnar vegna***
**Børnini við familjum**

Tey, ið vilja minnast Berthu, kunnu lata Heiminum við Vallalíð eina gávu, konta í peningastovnunum.


Mekanikari / lastbilførari

Til verkstað okkara søkja vit eftir dugnaligum mekanikara / lastbilførara til verkstaðið / flutningshjálpina.

Kranaprógv er fyrimunur

Byrja skjótast gjørligt

Bilvask
Vit vaska bilin innan og uttan
Verkstaður
Dekk, oljuskift og umvælingar
Leigubilar
Persón- og vøruvognar. Góðir og biligir
Flutningshjálp
Vit flyta bilar, maskinur o.m.a.

BILRØKT SUVO ANTI-RUST
Borgar fyri góðsku...
Stiðjagøta 3 · Postsmoga 1234 · tel. 35 88 88
bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo



Jóladøgverðatilboð frá Føroya Keypssamtøku um alt landið

Íslendskar rullupylsur

Fyri kilo 49⁹⁵

Nakkasteikir – kjøtugar uml. 2,8 kg

Fyri hvørja 129⁹⁵

Íslendsk lambskrov – nýflett

Fyri kilo 49⁹⁵

Íslendskir lambsbøgir – strektir, 1,2-1,4 kg

Fyri hvønn 69⁹⁵

Turrur fiskur – íslendskur

400 g fyri 159⁹⁵

Lambstjógv – nýsælendsk uml. 1,8 kg

Fyri hvørt 119⁹⁵

Cherry Valley dunnur 3200 g

Fyri hvørja 129⁹⁵

Um alt landið!
fk